# Sjórænarar yvirtaka




Tá ið fløskupostarnir vóru kastaðir á sjógv, stevndi sjórænaraflotin inn aftur í víkina. Børnini vóru spent til bardagan

Mynd: Esbern Hansen

**Sjómannadagurin varð sjósettur í gjárkvøldið við einari fiskikapping, sum endaði sum ársins familjutiltak. Við góðum veðrið, hugagóðum børnum og spælisjúkum útróðrarmonnum gekk alt upp í eina hægri eind**

SJÓMANNADAGURIN
*Dorit Hansen*
*dorit@sosialurin.fo*

Tætt var millum tráðurnar á Kósabrúnni í gjárkvøldið, tá ið Sjómannadagurin byrjaði við einum framúr væleydnaðum familjutiltakið. Børnini løgdu líka í fiskidagakjak og húkakreppu. Her varð fiskað, sum stóð tað um lív, børnini koyrdu agn uppá og hildu sjálvi á tráðuni, og tá so tað stóð á dorgini, hjálptu foreldrini spent til at fáa fongin í land.

Fiskikappingin vardi ein tíma, og í dýrdarveðri við setandi sól gekk tímin skjótt. Fyriskipararnir vóru sjórænaraklæddir og tað sama vóru mong av børnunum. Tá ið fiskikappingin varð farið í sjórænarakríggj.

Tað kendist næstan sum lagnurnar speisemi, at samstundi sum landsins hægstu menn og kvinnur standa í orrustu um framtíðina hjá húkaflotanum, royndu útróðramenninir í Klaksvík ein alternativan vinnuveg fyri siðbundnu útróðrarbátarnar.

Men inntøkurnar frá tiltakinum vóru ikki stórar, alt tiltakið var ókeypis, soleiðis sum siður er á Sjómannadegnum. Hetta var ein góð byrjan til ársins sjómannadag. Meðan stríð og rumbul valdar í politikkinum, ráddi hugnin og spæligleðin á bryggjuni og vágni í Klaksvík.



Tætt var millum teir átta bátarnar á vágni, og meðan teir silgdu runt sum radiobilar í Tivoli, lýsti spæligleðin av bæði børnum og vaksnum

Mynd: Esbern Hansen



Nógvir sjórænarar vóru millum børnini, og tey fingu eisini eitt minningarríkt sjórænarakríggj

Mynd: Esbern Hansen